# Semja millum Akademikarafelagið og Fíggjarmálaráðið

## 1. Sáttmálalaskeið og lønarhækkingar

Verandi sáttmáli verður endurnýggjaðyr frá 1. oktober í 2019 til tann 1. oktober í 2022.

Lønartalvurnar fyri cand. polyt v.m. og cand. phil. v.m og BA:

- Tann 1. oktober í 2019 hækka mánaðarlønirnar 2,56%
- Tann 1. januar 2021 hækka mánaðarlønirnar 2,05%
- Tann 1. oktober 2021 hækka mánaðarlønirnar 1,20%

BA lønartalvan

Tann 1. januar 2021 verður bachelorstigin broyttur soleiðis sum hjálagda lønartalva lýsir – 10 stig og endalønin tann 1. januar 2021 er 37.338 kr. Starvsfólk verða flutt nærmast yvir.

Bachelorar, sum tann 1. oktober 2020 eru á stigum hægri enn stig 6, vera fluttir í serliga lønartalvu (Gamlir BA).

## 2. Broytingar í sáttmálanum (gildiskoma tann 1. januar 2021)

§ 2. Setan. Stk. 2 verður soljóðandi:

Er talan um tíðaravmarkaða starvssetan, skal lýsingin siga neyvt frá um hesi viðurskifti. Ikki er neyðugt at lýsa størv leyst, um starvstíðin er styttri enn 6 mánaðir.

**§ 6, stk. 3** Ásetingin í stk. 3 um starvsbrot verður strikað.

**§ 20 Nýtt stk. 3 og 4** (um arbeiði á fremmandum arbeiðsstaði)

stk. 3. Ferðing í sambandi við tænastuferð verður roknað sum arbeiðstíð, tó hægst 13 tímar um døgnið, uttan so at annað er avtalað millum starvsfólk og arbeiðsgevara.

stk. 4. Arbeiði á fremmanda tænastustaðnum telur við í arbeiðstíðini eftir vanligum reglum fyri uppgerð av arbeiðstíð.

**Nýggj § 22. Serflokking og viðbøtur**

Ein arbeiðsgevari kann, tá ið umstøðurnar tala fyri, tilnevna eitt starvsfólk sum serfrøðing.

Mannagongdin er, at arbeiðsgevarin vendir sær til sítt aðalráð (er tað ikki aðalráðið sjálvt), sum síðan vendir sær til Lønardeildina í Fíggjarmálaráðnum at fáa tað góðkent. Verður tað góðkent, kann arbeiðsgevarin fyri eitt ávíst tíðarskeið ikki longri enn 3 ár í senn, tilnevna starvsfólkið sum serfrøðing, og veita eina serfrøðingaviðbót upp í 4.000 kr. um mánaðin. Verður umbønin ikki góðkend, grundgevur Lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum fyri tí. Umbønin kann ikki verða noktað aleina við tilvísing til, at talið av serfrøðingum er ella verður ov høgt.

Starvsfólkið skal hava minst 5 ára royndir frá viðkomandi starvi, ella samsvarandi eftirútbúgving/eykaútbúgving, og hava servitan á høgum fakligum stigi. Eisini er partur av metingini, um starvsfólkið antin hevur ávísan serligan førleika, sum starvið krevur, um starvið ber í sær ábyrgd út yvir tað vanliga, um starvsfólk í slíkum starvi er undir trýsti út yvir tað vanliga, ella um onnur serlig viðurskifti gera seg galdandi. Í tilnevningini skal verða útgreinað, hvat tað er, sum ger, at hetta starvsfólkið verður tilnevnt serfrøðingur. Serfrøðingar eru ikki fevndir av § 24 um yvirtíð.

*Stk. 2.* Arbeiðsgevarin kann geva eina uppgávutengda, tíðaravmarkaða viðbót, tá ið støðan á arbeiðsplássinum er serlig og nakað eyka verður kravt av starvsfólkunum. Viðbótin skal minst verða 2.000 kr. og hægst 4.000 kr. um mánaðin, og tíðarskeiðið, ein kann fáa viðbót, skal hægst vera 9 mánaðir hvørja ferð. Arbeiðsgevarin skal kunna AKF og Lønardeildina í Fíggjarmálaráðnum, tá ið viðbót verður latin.

*Stk. 3.* Lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum kann áleggja arbeiðsgevaranum at steðga viðbótum eftir stk. 1 og 2, tá ið mett verður, at treytirnar eru ikki loknar. Í tí føri verður viðbótin steðgað við rímiligari freist, og verður AKF kunnað í hvørjum einstøkum føri.

*Stk. 4.* Deildarstjórar, deildarleiðarar, ráðgevar, starvsfólk sum fáa aðrar viðbøtur (t.d. á Fróðskaparsetrinum og øðrum granskingarstovnum) kunnu ikki fáa viðbót sambært stk. 1 og 2. Starvsfólk, sum fáa viðbót eftir stk. 1, kunnu ikki fáa viðbót eftir stk. 2. Viðbøtur sambært stk. 1 og 2. eru ikki eftirlønargevandi.

*Stk. 5.* Metir arbeiðsgevarin ikki grundarlag longur er fyri viðbót sambært stk. 1, kann hendan verða steðgað, hóast avtalaða áramálið er ikki runnið, undir somu fyritreytum sum annars eru galdandi fyri uppsøgn av viðkomandi starvsfólki.

**Viðmerking til § 21**

*Í førum har ivi í sambandi við flokking er um innihaldið og støði av einari útlendskari útbúgving skipar Studni fyri, at meting verður fingin til vega frá Styrelsen for Forskning og Uddannelse. Umsóknir verða sendar til meting@studni.fo.*

Tórshavn 8. desember 2020

| | |
|---|---|
| *Akademikarafelag Føroya* | *Fíggjarmálaráðið* |
| Páll Nolsøe, formaður | Jørgen Niclasen, landsstýrismaður |

Roland Thomassen, AF